Skálin »Skálaborg« byggjast á Skálatrød

Ætlanin er at byggja ein stóran, rundan bygning á Skálatrød í Havn í seks hæddum, sum skal hýsa handlum, matstovum, skrivstovum, eldraíbúðum og vanligum íbúðum. Gongst sum ætlað, verður bygningurin klárur at flyta inn í í oktober í 2004

BYGGING
Eirikur Lindenskov

Soleiðis hugsa Albert Isfeld og Gudmund Hansen, arkitektar, sær, at bygningurin og Skálatrød fer at síggja út, tá hann stendur liðugur í oktober 2004

Tað var ikki hissini verkætlan, sum varð løgd fyri býráðslimirnar í Havn hóskvøldið. Ein arbeiðsbólkur legði fram fyri býráðspolitikararnar í Tórshavnar Býráð eina ætlan um at byggja ein stóran, sermerktan bygning á Skálatrød. Talan er um ein rundan bygning í seks hæddum, har gólvvíddin tilsamans er 7.000 fermetrar.

Ætlanin er, at bygningurin skal hýsa eldraíbúðum, vanligum íbúðum, skrivstovum og øðrum virksemi. Á fyrstu hædd er ætlanin at hýsast skal annað virksemi, so sum handlar, matstovur o. s. fr.

– Ætlanin er ment á einum vinnuligum grundarlag, sum skal tryggja, at tað er møguligt hjá íleggjarum at vera við í ætlanini, sigur Mortan Carlsen, sum saman við NCC, Føroya Filial í Leynum, Byggitek og arkitektunum Albert Isfeld og Gudmund Hansen, hevur fyrireikað ætlanina.

Tørvur á íbúðum og skrivstovum

Fyrireikararnir siga, at ætlanin er grundað á tann alsamt vaksandi tørvin, sum so sjónliga kemur fram í Havn.

– Her verður serliga hugsað um tørv á íbúðum, bæði til eldri fólk og fólk annars. Útboðið av skrivstovum stendur heldur ikki mát við tann tørv, sum er í høvuðsstaðnum í dag, sigur Mortan Carlsen.

Fyrireikararnir halda eisini, at tørvurin er grundaður á menningina, sum er farin fram í høvuðsstaðnum, og sum teir meta fer at halda fram í nógv ár framyvir.

– Tí meta vit, at tað er neyðugt, at býráðið virkar fyri, at karmar verða skaptir fyri framhaldandi menning av virkseminum í býnum og góðum liviumstøðum annars, sigra teir.

Teir halda eisini, at tað er skilagott at birt verður upp undir, at hendan verkætlanini verður framd á Skálatrød, sum næstan er eitt »deyðpunkt« í Havnini.

– Hendan ætlanin fer at føra við sær, at hesin partur í størri mun verður sameintur við miðbýin – handilslívið og um hvørvið annars, og at fólk seta búgv í hesum øki fer at føra við sær, at meira lív og meira virksemi verður í hesum miðstaðarøki, sigur Mortan Carlsen.

Tað var ein skálamaður, sum legði inn Skálatrød. Hann búði í Bartsksstovu í Bringsnargøtu, har handilin hjá Katrinu Christiansen er.

– Tí hevði tað kanska verið passandi, at bygningurin fekk navnið »Skálaborg«, sigur Mortan Carlsen.

Og hvør veit, kanska bygningurin hervið fekk navnið…?

Eldraíbúðir, íbúðir og skrivstovur

Byggiætlanin snýr seg um ein rundan bygning í seks hæddum. Samlaða gólvvíddin verður umleið 7.000 fermetrar. Inni í bygninginum verður eitt runt op frá niðastu hædd og allan vegin upp. Hetta verður ein høll, takt við glasi.

Fyrireikararnir hugsa sær at gera ein leigusáttmála við kommununa um grundøkið, og teir hugsa sær, at teir eisini verða við í eini ætlan um at útvega fleiri parkeringspláss í býnum.

Ein høvustáttur í ætlanini er eldraíbúðir. Ætlanin er bygd á, at eldraíbúðir skulu vera í tveimum støddum, onnur umleið 64 fermetrar og hin umleið 96 fermetrar. Eisini er ætlanin, at serlig fyriskipan skal gerast fyri at tryggja, at hesar íbúðir í framtíðini eisini skulu verða tøkar til eldraíbúðir, tískil serligar treytir við víðari sølu, keypi og nýtslu.

Annar høvuðstáttur í ætlanini eru íbúðir, sum øll kunnu keypa.

– Hesar eru ætlaðar í trimum støddum, umleið 64 fermetrar, 96 fermetrar og 130 fermetrar, sigur Albert Isfeld, arkitektur.

Viðvíkjandi hesum íbúðum eru ongar serligar treytir, eins og við eldraíbúðunum, tá tað snýr seg um víðari sølu o. s. fr.

Triði høvuðstátturin í ætlanini eru skrivstovuhøllini, sum ætlanin er at hava á aðru og triðju hædd. Hesi høli verða væntandi boðin út til leigu í tann mun, at ánararnir ikki sjálvir ætla at gera nýtslu av teimum.

Í niðastu hæddini er ætlanin at hýsa handlum, matstovum o. l.

Standa liðugt í oktober 2004

– Vit hava ongar avtalur enn gjørt við íleggjarar, hóast vit hava tosað við fleiri í Føroyum og onkran einkultan uttanlands, sigur Mortan Carlsen.

– Av tí at verkætlanin ikki er liðug í smálutum fyriliggja enn ikki neyvar greiningar av m. a. samlaða byggikostanðinum. Tað hevði tí ikki verið gjørligt hjá ílleggjarum at gjørt endaligan sáttmála í sambandi við verkætlanina.

Fyrireikararnir hava handað býráðnum umsókn um økið á Skálatrød – í fyrsta umfari um optiónsrætt í eitt ár fyri síðani at finna út av, um fyritreyt er fyri hesi ætlan.

– Í hesum tíðarskeiði ætla vit at gera ætlanina lidna og leggja hana fyri ílleggjarar, sigur Mortan Carlsen.

Sambært tíðarætlanini fara teir at lata inn endaliga byggiumsókn í august í ár. Skitsuprojektið varð handa býráðnum hósdagin, og í mai skulu fyrireikingarnar verða komnar undir land. Myndugleikaprojekt skal fyriliggja í august, og skal húsið standa liðugt í oktober 2004.

Skálaborg: Ein spennandi verkætlan

– Hetta er nýtt, hetta er stórt, hetta er spennandi, og hetta er kollveltandi. Hesi vóru nøkur av lýsingarorðunum, Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn nýtti um verkætlanina á Skálatrød

BYGGING
Eirikur Lindenskov

Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn

Jan Christiansen er hugtikin av verkætlanini um at byggja ein 7.000 fermetra stóran bygning á Skálatrød til at hýsa skrivstovum handlum, eldraíbúðum og øðrum íbúðum.

– Vit skulu minnast til, at hetta liggur mitt í býnum, og nógvir havnarborgarar hava eina meining um hetta. Tí dámar mær væl, at fyrireikararnir longu nú hava skipað fyri einum tíðindafundi, soleiðis at ætlanin kann leggjast fyri borgararnar beinanvegin, sigur Jan Christiansen.

Borgarstjórin heldur, at ætlanin er í tráð við byggiætlanina fyri økið, sum er ein partur av miðbýnum í Havn. Hann heldur somuleiðis, at tað er gott, um býurin kann verða klárur til stóra eftirspurningin, sum kann koma í kjalarvørrinum av eini oljuvinnu.

– Tá kunnu vit vænta eitt rættuligt »boom«, og tá ræður um, at býurin er fyrireikaður, so tann nógvi kapitalurin, ið tá kann væntast, ikki tekur ræði á øllum. Og gott er, um býurin tá er klárur við skrivstovuhølum við rætta kvalitetinum.

Jan Christiansen sigur, at býráðið ongar konkretar ætlanir hevur havt við økinum á Skálatrød, síðani uppskotið um eldraíbúðir varð vrakað í 1989. Hann sigur eisini, at nógv trýst er á at fáa øki í miðbýnum – bæði til skrivstovur og til íbúðir.

– Tað er í øllum førum óhugsandi at, at Skálatrød verður liggjandi undir asfalti í allar ævir, sigur hann.

Teir, ið hava fyrireikað uppskotið um stóra, runda bygningin á Skálatrød, hava samstundis bjóðað sær til at hjálpa kommuni við at útvega fleiri parkeringsøki í miðbýnum. M. a. mæla teir til, at parkeringsberghol verða sprongd, eitt nú í bergið undir Krákusteini við Eystaruvág. Men hevur býráðið slíkar ætlanir?

– Nei, tað hava vit ikki, sigur Jan Christiansen, sum kortini heldur tankan verða áhugaverdan. Hann vísir á frystitunlarnar í Fuglafirði, sum hava givið sera gott úrslit og hava verið lutvíst bíligir.

»Skálaborg«, sum bygningurin møguliga skal eita, er í seks hæddum, opin í miðjuni. Tað slepst til alt virksemið í bygninginm av svalum , sum eru kring miðhøllina



Skal verða ein týðandi partur av miðbýnum í Havn

Hóast ætlanin er at byggja stóra bygningin, sum kanska fer at eita Skálaborg, á parkeringsplássinum á Skálatrød, so verða ikki færri parkeringspláss á staðnum av teirri orsøk

BYGGING
Eirikur Lindenskov

Fyrireikararnir siga, at teir hava uppskot um at brúka økið øðrvísi, og at bilar lutvíst kunnu parkera undir bygninginum. Í dag eru 169 parkeringsbásar á Skálatrød, tá húsið er liðugt, verða 183, siga teir.

– Vit eru sjálvandi greiðir yvir, at at tílíkt hús fer at økja munandi um parkeringstørvin, og tí er tað, at vit bjóða okkum til at hjálpa kommununi við at finna aðrar parkeringsloysnir í býnum, sigur Mortan Carlsen.

Í ætlanin siga teir, at parkeringstørvurin kann loysast við parkering undir jørð inn frá berginum á Kongabrúnni (Krákusteini) og í Álakeri, eins og við nýggjum parkeringsplássi í brekkuni í J. Patursonargøtu og Yviri við Strond.

Økið á Skálatrød er millum Rættará og Vágsbotn. Tað er umgyrt vestanfyri av fabrikkini hjá Østrøm og timburhandlinum hjá Valdemar Lützen. Móti norði er stórt grótbrot og vestanfyri eru smiðjurnar og bygningar í ymiskum sniði. Sunnanfyri eru bátabrúgvarnar.

Mortan Carlsen, ein av stigtakarunum

Uppskotið fevnir um at gera ein bygning í seks hæddum, sum skal róma eldraíbúðum, øðrum íbúðum og øðrum virksemi, so sum smáhandlum, matstovum o. s. fr.

Hugsandi er, at tríggjar tær ovastu hæddirnar verða brúktar til íbúðir, ein partur til eldraíbúðir. Tvær verða nýttar til skrivstovu, og niðasta hæddin verður til handlar, matstovur o. s.fr. Endaliga býtið av hesum er ikki greitt enn, siga fyrireikararnir.

– Kring økið er í dag bygging í fjølbroyttum skapi og litum, og tað liggur sum ein varði frá farnari tíð. Hetta økið, sum liggur á fyrstu parkett, kann tykjast sum ein gloymdur blettur mitt í býarmyndini, siga teir.

Tí halda teir, at teir við hesum bygninginum skapa ein bygning, sum fyriheldur seg neutralt til verandi bygging og skal framtrína sum ein skulpturur, ið byggilistarliga og í tilfari umboðar nútíðar bygging.

Bygningurin er í seks hæddum, rundur í skapi við hallandi síðum og verður settur mitt á Skálatrød og verður sjonligur frá stórum parti av býnum, frá sjónum verður hann at daga upp í býarmyndini sum landmark.

Miðan í bygninginum verður runt rúm – ein rotunda – hetta er forhøllin í bygninginum, sum ongur upp gjøgnum allar hæddirnar og her atkoma frá svalum tl bæði íbúðir, skrivstovur og annað virksemi.

Miðrúmið er eitt innilokað útirúm, sum hevur glastgak, sum gevur sera gott dagsljós.

Í hesum høga rúmi ber til at seta upp stórar skulpturar, hangandi glasmyndir og annað til prýðis, og eisini er ætlanin at virksemi av serligum slag í býnum kann fara fram her, eitt nú listaframsýningar, tónleikarframførslur, sjónleikur o. s. fr.

– Vit kunnu siga, at bygningurin við hesum verður ein partur av miðbýarvirkseminum í Havn, sigur Albert Isfeld, arkitektur.

Á hesum korti er uppskot um, hvussu parkeringsviðurskiftini í miðbýnum í Havn kunnu loysast

Soleiðis fer bygningurin at taka seg út í lendinum. Aftanfyri hómast bygningarnir hjá Valdemar Lützen…